90 SEKUND

# HØGNI MOHR

LAGT TIL RÆTTIS: Heini í Skorini




**FAKTA HØGNI MOHR**

Høgni Mohr er 41 ára gamal. Starvast sum tíðindamaður í Kringvarpi Føroya. Útbúgvin maskinsmiður. Hevur starvast sum arbeiðsmaður, tíðindamaður og fríyrkishøvundur.

MYND: JENS KRISTIAN VANG

# Regn, vindur og **kúgandi** kristindómur

**Um tú bleiv stjóri í Kringvarpinum í morgin, hvat hevði tú so gjørt?**
Lagt frá mær. Eg eri ikki egnaður sum stjóri og havi ongantíð havt ambitiónir um tað.

**Hvat er tað besta við at starvast sum journalistur?**
At sleppa tætt at lívi og kenslum hjá øðrum menniskjum, og at síggja, at tíðindi fáa avleiðingar.

**Fáa tíðindi nóg ofta avleiðingar?**
Nei, alt ov sjáldan. Endin verður ov ofta sleptur, áðrenn man er komin á botn, og so hendir einki.

**Hvat er tað ringasta?**
Millum annað at fólk hava gron við meg fleiri ár, tí eg havi skrivað ella sagt okkurt púra rætt, sum teimum bara ikki dámar.

## Hvør er tín fyrimynd?
Í tíðindayrkinum? Uttan iva Georg L. Petersen!

**Hví Georg?**
Hann hevur dirvi, indignatión og er ein góður redaktørur.

**Hvat er Føroya mest inspirerandi menniskjað?**
Fyri meg má tað vera kona mín, Majbritt. Hon kann fáa meg til alt møguligt, sum eg neyvan hevði fingið upp í lag annars.

**Hvat elskar tú við Føroyum?**
Náttúruna, menniskjuni og familjukensluna; at allar dyr standa á víðum veggi at kalla.

**Hvat hatar tú við Føroyum?**
Regn og vind 50 dagar út í eitt, kúgandi kristindóm, og at ov nógv fólk í klædningi og sólbrillum spæla spælið "at hoyra til" og "netverka" seg fram at sessum, tey ikki eiga at sita í. Og so hesar alvitandi verurnar, sum hava google sum startsíðu á telduni (Image is everything - but real!)

**Um tú slapp at liva tey seinastu tjúgu árini umaftur, hvat hevði tú so gjørt øðrvísi?**
Hugsa meira um míni nærmastu enn meg sjálvan.

**Hvør er tín absolutt størsti brølari?**
At eg ikki havi verið meiri árvakin heima.

**Hvør er størsti brølarin, sum nakrantíð er gjørdur í Føroyum?**
Landnámið.

**Hvat er títt besta ráð til løgmann?**
Ver sitandi!

**Hví skal hann vera sitandi?**
Tí hann samsvarar so væl við politisku støðuna í landinum og okkara fatan av tí politiska apparatinum.

**Hvat er eitt gott lív?**
Gev mær góðan mat mangan, viðurkenning viðhvørt, eitt lítið av og á, ein vin at stuðla mær stundum, og fríska luft, frið á vesinum og eitt ísakalt brúsubað hvønn dag. So koyrir tað.

**Hvør hending hevur havt størstan týdning fyri teg?**
At eg møtti Majbritt, og at vit fingu børn saman.

**Hvat tíðarskeið í lívinum hevur verið tað besta?**
Einki ávíst. Kenslan av fullkomnari eydnu hevur altíð verið har í løtum.

**Hvat hevur verið tað ringasta?**
Viðhvørt er lívið bara nakað lort.

**Nær?**
Til dømis tá man hevur dummað seg yvir fyri øðrum menniskjum.

**Um tú var ósjónligur í eina viku, hvat hevði tú so gjørt?**
Súkkla í havnargøtum; tað hevði sæð stuttligt út!

**Hvør dreymur skal realiserast í nærmastu framtíð?**
At fara til Nýsælands at halda frí eftir næstan hálvt annað ár uttan feriu, og so gerast virkin aftur sum fríyrkishøvundur.

**Hvat hevur lívið lært teg?**
At tað skal livast beint nú og ikki útsetast til í morgin.

**Hvar stendur tú átrúnaðarliga?**
Eg viðurkenni, at nógvum menniskjum tørvar trúgv; bæði til tyngstu løturnar í lívinum og til tess at kunna liva við viðurkenningini um, at lívið helst er meiningsleyst og endar, tá ið tú doyrt. Sjálvur biði eg, tá ið eg eri ordiliga keddur. Og, sum omman gjørdi, biði eg Jesus fylgja børnunum. Og so biðið eg faðirvár við døttrini. Jú, jú, har er nokk av andaligheit. Men meira, menniskju prædika, minni trúgvi eg.

## Hvat óttast tú?
Panikkangist.

**Motto?**
Beint nú hetta, sum vinmaðurin Michael Moore eigur: Why vote? It will only encourage them!